# Christian til Århus

Christian Lamhauge Holst skal mánakvøldið royna seg í dysti í superliguni. Lyngby, sum seinasta mátti leggja rygg til stórtap, skal mánakvøldið spæla á Århus Stadion. AGF flutti upp í superliguna í summar, og tað gjørdu teir saman við júst Lyngby. Tí liggur ikki sørt av týdningi í dystinum í kvøld, tí roknað verður við, at bæði AGF og Lyngby koma at stríðst fyri at yvirliva í superliguni í hesum kappingarárinum.



# Eriksson rósar Schmeichel

Ungi Kasper Schmeichel stendur seg í hesum døgum væl í enska felagnum Manchester City, har hann nakað óvæntað hevur fingið kjansin á besta liðnum. Leygardagin bjargaði hann millum annað brotsspark í dysti ímóti Arsenal. Venjarin hjá Manchester City, Sven-Gøran Eriksson, rósar Schmeichel fyri avrikini. - Hann er ikki av størstu málmonnum, men hann er djarvur, sigur Eriksson um unga danan.

## Taka tað róligt

- Nei. Nú mugu tit slappa eitt lítið sindur av. Her er so einki tos um nakað meistaraheitið.

Svarið er bæði flennandi og álvarsamt, tá Rógvi Jacobsen verður spurdur, hvørt hann og HB eru í ferð við at endurtaka bragdið frá endaspurtinum í fjør.

- Sjálvandi spæla vit fyri møguleikanum, so leingi hann er til staðar. Men har eru altso tvey góð lið, sum eru átta stig framman fyri okkum, so har skal henda heilt, heilt nógv, um vit á nakran hátt skulu tosa við um tann spurningin, heldur Rógvi Jacobsen.

Men tað tykist í øllum førum, sum spæla tit meira frítt nú, enn tit hava gjørt?

- Ja. Eg haldi, at vit hava funnið spæligleðina aftur. Tað ger av sær sjálvum, at spælið gongur betri, og tá vit so eisini hava hildið so hampuliga tætt í verjupartinum, verður alt so nógv lættari. Enn hava vit eisini nógv at spæla fyri. Vit kappast við EB/Streym um bronsuplássið, og vit hava eisini møguleikan at arga B36 og NSÍ eitt sindur, so vit koyra á við fullari ferð. Men hvussu langt tað røkkur fara vit altso ikki at tosa um. Vit taka ein dyst í senn, og í teimum spæla vit hvørja ferð fyri sigrinum, sgur Rógvi Jacobsen.

Skála-HB 1-3 (0-1):

# Meistararnir spæla nú frítt

**Nú nervarnir eru burtur, hevur HB veruliga fingið glið á. Og tó at munurin upp er stórur, so verður spakuliga tutlað um endurtøku av fantastiska endaspurtinum í fjør**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*HB*



*Skála*

Hjá flestu fótbóltshugaðum føroyingum – og í øllum førum hjá HB-fjepparum – fer endaspurturin av landskappingini 2006 at standa í minninum sum árið, tá HB framdi tað ógjørliga. Hetta tá teir í míggju umførum kvettu átta stiga munin til EBS/treym burtur, soleiðis at enn eitt meistaraheitið kundi vinnast til mest sigursvanda felag í landinum.

Við sjey dystum eftir av ársins Formula-kapping er HB nú átta stig aftan fyri oddaliðini. Tað gevur í sjálvum sær eitt enn verri útgangsstøði, enn teir høvdu í fjør. Og við tveimum liðum í oddinum, eru fortreytirnar enn verri. Men eftir eina meira enn trilvandi fyrru hálvu eru nú aftur tey, sum halda, at HB er í ferð við at gera tað ógjørliga.



*Talan er sjáldan um lættan dyst hjá HB á Skála, men sunnudagin vunnu teir trý væl uppiborin stig*

*savnsmynd*

### Glið á

Kanska er tað júst tankin um, at trýstið nú er burtur, sum ger, at HB veruliga hevur fingið glið á. Uttan kontanta kravið um eitt FM-heitið hangandi á sær tykjast spælararnir í øllum førum at trívast munandi betri á vøllinum, og sunnudagin gjørdist talan um tryggan sigur á Skála.

Til tíðir varð bólturin koyrdur runt í reyð/svørtu røðunum í vøkrum mynstrum, tað er valla ein Skálafjeppari, sum við góðum vilja fer at siga, at gestirnir ikki áttu stigini uppiborið.

Tað tók tó sína tíð, áðrenn hol kom á. Men stutt fyri hálvleik bar tó til. Innskifti Tór-Ingar Akselsen breyt ígjøgnum, og tá Predrag Markovic bert kundi hálvbjarga skotroyndini, var Andrew av Fløtum skjótur á returinum, so hann kundi senda sítt sætta mál í fýra dystum í meskarnar.

Heilt tannleysir vóru vertirnir tó ikki, og stóran part av seinna umfarinum royndu teir at trýsta. Tað vildi tó ikki geva úrslit, og gott korter fyri leiklok var tað ístaðin HB, sum setti trumf á. Í einum góðum mótálopi gjørdist Rógvi Jacobsen blankur, so hann kundi økja til 2-0, og tá Milan Kuljic við fløtum skoti skoraði til 3-0 fór seinasta luftin úr Skála. At Pauli G. Hansen beint undan leikloki minkaði um munin, hevði sum so onga ávirkan.

# Besta vikuskiftið hjá B68 í ár

**Formula fótbóltur næsta ár varð so at siga tryggjaður, tá ið B68 vann í Gundadali, meðan bæði ÍF og FSV04 einki fingu burturúr**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er stórur møguleiki fyri, at B68 longu komandi leygardag fær fulla trygd fyri, at tað næsta ár verður sunnudagsfótbóltur á Svangaskarði. Fyrr í summar er onkra ferðina nevnt her, at sannlíkið var stórt fyri, at toftamenn fóru at tryggja sær uppflyting, áðrenn august mánaður var liðugur. Nú verður tað ikki í august, men tað verður eftir øllum at døma leygardagin 1. september!

Leygardagurin var so góður hjá B68, sum einki annað umfar hevur verið í ár. B68 vann tepran sigur á HB í Gundadali. Tað leikaði javnt á, og sigursmálið bíðaði, inntil tað restaðu sjey minuttir. Dánial Hansen sendi fríspark í brotsteigin, og Jósup Henriksen sneiddi við høvdinum bóltin í málið.

Tá ið næstu kappingarneytarnir hjá B68 – ÍF og FSV04 – bæði taptu sínar dystir, bar tað við sær, at nú tað resta seks umfør, er B68 fimtan stig undan ÍF og sekstan stig undan FSV04. Hesi bæði feløgini skului hittast í Sandavági í 24. umfari. Tí kann tað væl fara at vísa seg, at tað hjá B68 bara er neyðugt at vinna eitt stig afturat fyri at tryggja sær uppflytingina.

Sjálvandi vilja toftamenn flyta upp við manér. Leygardagin fer TB at vitja á Svangaskarði, og hóast einki alment verður sagt um tað, so skuldi tað ikki undra um rakettir vera í onkrum bilum og taskum á Svangaskarði.

TB spældi framúr væl í 1. hálvleiki, tá ið teir blástu ÍF av Sevmýri. Støðan var 3-0, og TB spældi seg ferð eftir ferð ígjøgnum ÍF verjuna. Eftir steðgin, tvær útskiftingar og umskipingar fótaði ÍF sær, og tað var um reppið, at fuglfirðingar rættiliga fingu um endan. Eftir tíggju minuttir minkaði Nenad Saric um munin, og tríggjar minuttir undan leikloki gav støðugt ÍF trýst aftur mál. Eftir at Høgni Zachariassen hevði minkað um munin til 3-2, hevði ÍF tvær ferðir bóltin í ÍF málinum, men báðu ferðirnar kolldømdi dómarin.

Ístaðin var tað sera vandamikli Sasa Jovanovic, sum við sínum triðja máli staðfesti TB sigurin, tá ið ÍF hevði spent álopsbogan so nógv, sum tað bar til.

Sjálvandi hjálpti tað upp á lagið á fuglfirðingum, tá ið tað frættist, at FSV04 hevði tapt 2-1 á heimavølli ímóti NSÍ, sum seinastu ferðirnar hevur havt trupulleikar. Annar av FSV04 venjarunum, Jákup Eli Olsen, segði seg í síðstu viku úr starvinum. Jan C. Dam er nú einsamallur venjari. Teir báðir hava verið miðverjar, men nú er hvørgin teirra á liðnum. Jan C. Dam varð skaddur í Sørvági næstsíðsta leygardag.

Heron legði FSV04 á odda við skoti úr vinstru og í handara síðunetið, tá ið stórt korter var farið. NSÍ javnaði, tá ið FSV04 var so óheppið eftir frísparksinnlegg at gera sjálvmál. Avgerandi var tað, at FSV04 orsakað av hevnisøku misti ein mann seint í 1. hálvleiki. Í 2. hálvleiki roynduundirmannaðuheimamenninir at trýsta. Men NSÍ var sera vandamikið í skjótum mótálopum, og unglingaspælarin Klæmint A. Olsen stútaði sigursmálið eftir frísparksframlegging úr vinstru frá veteraninum Eddie Mikkelsen.

Í Leirvík vóru fleiri klassar á muni, tá ið LÍF vann 9-2 á SÍ. LÍF hevur mist so nógv fyrr í summar, at møguleikin fyri heiðursmerkjum og uppflyting er burtur. SÍ er í vanda fyri at flyta niður, men sørvingar kunnu við heimasigri á botnliðnum B36 næsta leygardag lyfta seg nærri bjargingini.

B36 misti ivaleyst møguleikan fyri at varðveita plássið í deildini, tá ið KÍ fór við øllum stigunum úr Gundadali. Klaksvíkingar vóru omaná í 1. hálvleiki, tá ið Otto Jacobsen legði teir á odda.

Eftir steðgin var B36 ógvuliga framrættað, og beinanvegin javnaði verjuspælarin Bárður H. Joensen, sum var fluttur langt fram á vøllin. Hjá B36 var tað bara sigurin, sum taldi. Tí hildu teir fram við nógvum fólki frammarlaga og fáum monnum aftarlaga á vøllinum. Tað sektaði KÍ. John Hammer, sum síðstu tíðina hevur verið nógv á besta liðnum, legði KÍ framum, og í síðstu løtu staðfesti Jákup Hansen, sum spælir í vinstru, sigurin, tá ið bar við sær, at KÍ kom nærri bjargingini. Men enn restar nógv í hjá klaksvíkingum, áðrenn teir hava tryggjað sær eitt ár afturat í næstbestu deildini.